

www.oljan.fo

**Jan Müller** 31 - 08 - 2012

# Leita eftir olju og gassi á Setrinum

Um somu tíð sum Statoil borar á landgrunninum eru nýggju næmingarnir á Fróðskaparsetri Føroya farnir at leita eftir olju og gassi. Í dag er innleiðsludagur fyri tey nýggju lesandi á Fróðskaparsetri Føroya. Dagurin er skipaður sum PetroUniversity kapping, ið FOÍB og Simprentis skipa fyri við stuðuli frá Statoil. Luttakararnir eru býttir í bólkar, og hvør bólkur er eitt oljufelag, sum leitar eftir olju og gassi í lærusimuleringini OilSim. Endamálið við at skipa innleiðsludagin sum PetroUniversity kapping er, at tey lesandi koma at kenna hvønn annan betur, umframt at tey fáa innlit í eitt øðrvísi læringsamboð og innlit í oljuleiting, nú Statoil saman við øðrum borar áttanda leitibrunnin í føroyskum øki. Vinningur er til besta bólkin, og tað verður kunngjørt seinnapartin í dag. Sí myndir frá frá innleiðsludegnum, sum er á Öström í Havn sum myndafrásøgn á hesi síðuni og á forsíðuni á Portal.fo